# Kanna sukursjúku og dálkingarevni

**Útlendsk gransking hevur givið ábendingar um okkurt samband millum dálkingarevni og sukursjúkutíttleika. Pál Weihe og Jens Andreassen eru í gongd við at eina granskingarverkætlan, sum skal varpa nýtt ljós á samanhangin út frá føroyskum sjúklingum**

Jógvan Jákupsson



Vanliga verður hildið, at ein ósunnur lívsstílur økir um vandan fyri at fáa sukursjúku. Nú benda granskingarúrslit á, at dálkingarevni hava sítt at siga, tá vandin fyri sukursjúkur verður avgjørdur

Hvør er títtleikin av týpu 2 sukursjúku (sum eisini verður nevnd gamlamanna sukursjúka), og er nakað samband millum umhvørvisdálking og sukursjúku. Tað eru tey tvey orðaðu endamálini við einari granskingarverkætlan, sum læknarnir Pál Weihe og Jens Andreassen eru í gongd við í løtuni. Pál Weihe er stjóri á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, og Jens Andreassen er sukursjúkulækni á Landssjúkrahúsinum.

Týpa 2 sukursjúka verður vanliga sett í samband við ósunnar kostvanar, manglandi rørslu og yvirvekt. Í granskingarupplegginum verður víst til eina kanning gjørd í USA, sum gevur eina ábending um, at dálkingarevni hava sína ávirkan á sukursjúkutíttleika.

2000 fólk vórðu kannað fyri sukursjúku og seks dálkingarevni, sum kundu staðfestast í minst 80 prosentum av luttakarunum.

Tá hædd var tikin fyri vekt, kyni, miðjumáli og etniskari bólking, vísti tað seg, at hjá fólki sum samlað høvdu mest av teim seks dálkingarevnunum, var vandin fyri at fáa sukursjúku 38 ferðir størri enn hjá teimum, sum høvdu minst av dálkingarevnunum.

Afturat vísti amerikanska kanningin, at hjá teimum við minstu dálkingini var eingin samanhangur at finna viðvíkjandi sukursjúku og kropsvekt.

## 10 prosent um 15 ár

Víðari verður sagt í granskingarupplegginum, at spik av grind hevur stórar konsentratiónir av teimum dálkingarevnum, sum eru undir illgruna fyri at geva vanda fyri týpu 2 sukursjúku.

Er nakað samband millum umhvørvisdálking og sukursjúku, so hevur tað týdning fyri bæði føroyska samfelagið eins og onnur samfeløg, sum vit vanliga samanbera okkum við.

Víst verður til metingar, sum siga, at meiri enn tíggju prosent av fólkinum fara at hava sukursjúku í Danmark um fimtan ár. Og helst nakað tað sama í Føroyum eisini.

Ein trupulleiki í hesum sambandi er, at vit ikki hava nøkur góð og álítandi tøl hava um sukursjúku í Føroyum, hóast at ein stórur partur av fólkinum hevur hana.

Sambært granskingarupplegginum eru upplýsingar, sum benda á, at okkurt um seks prosent av fólkinum í Føroyum hava sukursjúku. Ein skjót útrokning gevur um 2900 fólk. Tað líkist teimum tølunum, sum hava verið nevnd hesa seinastu tíðina.

Kanningin fer fyri fyrstu ferð at geva álítandi tøl fyri, hvussu nógv fólk hava týpu 2 sukursjúku í Føroyum.

## Kanna 1600 fólk

Tríggir bólkar av føroyingum verða kannaðir. Hin fyrsti umfatar 142 fólk í 70 ára aldri, sum eru kannað frammanundan. 63 høvdu sukursjúku og 79 høvdu høg blóðsukurvirði. Tey vórðu øll boðin aftur til kanningar.

Ein annar bólkur í aldrinum 40 til 70 ár varð valdur við útgangsstøði í MARK-kanningini, sum varð gjørd í 2007 (Motión, Alkohol, Royking og Kostur). Av 1970 fólkum søgdu 44 seg hava sukursjúku og 416 høvdu blóðsukurvirði í hægra lagi. Ætlanin var at fáa øll tey 460 fólkini inn aftur til kanningar.

Og til ein triðja bólk var ætlanin at velja tvey túsund tilvildarliga vald fólk í aldrinum 40 til 70 ár. Vónandi fór helvtin av teimum at vilja luttaka. Tað skuldi so givið okkurt um 1600 fólk tilsamans.

Hvørt fólk skuldi so kannast fyri vekt, hædd og feittprosent, umframt at tey skuldu svara einum spurnarblaði um kost, rørslu og annað. Tey blivu so eisini kannað fyri møguligar dálkingarevni.

Umframt teir báðar læknarnar Pál Weihe og Jens Andreassen, sum hava staðið fyri kanningini, hava Maria Skaalum Petersen og Jónrit Halling hjálpt til við sjúklingum og dátuviðgerð. Viðkomandi deildir á Syddansk universitet og Odense Universitetshospital hava hjálpt til við serkunnleika og útgerð.

Kanningin verður liðug og úrslitini almannakunngjørd um nakrar mánaðir. Ella við øðrum orðum; seinri í hesum árinum.

**Innbjóðing at luttaka í granskingarverkætlanini: Sambandið millum sukursjúku og dálkingarevni**

Á heysti 2007 vóru tygum við í eini kanning av heilsustøðuni hjá føroyingum, sum bar heiti MARK (**M**otión, **A**lkohol, **R**oyking og **K**ostur). Tygum svaraðu tá einum spurnablaði har m.a. varð spurt, um tygum høvdu sukursjúku, og harafturat varð ein blóðroynd tikin til tess at kanna m.a. blóðsukrið. Tað er í hesum sambandi, at vit nú aftur seta okkum í samband við tygum. Ætlanin er nú at fara undir eina verkætlan um typu 2 (gamlamanna) sukursjúku. Verkætlanin hevur tvey endamál: 1) at staðfesta títtleikan av typu 2 sukursjúkutilburðum í Føroyum og 2) at kanna, um samband er millum umhvørvisdálking og sukursjúku.

Seinnu árini eru kanningar gjørdar í eitt nú USA, sum týða á, at ávís dálkingarevni kunnu elva til sukursjúku. Millum hesi evni er t.d. PCB, sum finnist í stórum mongdum í spiki, og hava vit í Føroyum tí góðan møguleika at kanna hesi viðurskifti. Onnur evni, sum illgruni er um kunnu elva til sukursjúku, eru m.a. flammutarnandi evni, sum verða brúkt til húsarhaldstól, innbúgv og annað, soleiðis at hesi ikki brenna so lætt.

Mett verður, at uml. 30-40% av teimum, sum hava typu 2 sukursjúku, ikki eru vitandi um tað. Tað er ikki óvanligt, at sjúklingar hava havt sjúkuna í eini 6-8 ár, tá hon verður staðfest. Tá kann sjúkan hava gjørt skaða á t.d. eygu, nýru ella nervalag, og verður mann tískil varugur við sjúkuna tann vegin. Um sjúkan verður staðfest og viðgjørd tíðliga, eru sannlíkindi fyri fylgisjúkum nógv minni.

Ein partur av teimum fólkunum, sum eru grundarlag undir hesi granskingarverkætlanini, er funnin út frá MARK-verkætlanini, sum fór fram í 2007. Myndin tikin úr luttakarabrævi frá Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu.



SETT UPP: REGIN DAVIDSEN

Læknarnir Pál Weihe og Jens Andreassen hava tikið útgangsstøði í m.a. amerikanskari gransking, sum hevur givið ábendingar á, at dálkingarevni havatýdning fyri sukursjúkutíttleika Mynd: Jógvan Jákupsson